Mentamálaráðið
FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ

## Rektari til Føroya Studentaskúla og HF-skeið

Rektarastarvið á Føroya Studentaskúla og HF-skeið er leyst at søkja.
Umsóknarfreistin er mikudagin 3. januar 2007, kl. 16.00.

Meira fæst at vita á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo (undir teiginum „leys størv“)

Sí eisini heimasíðuna hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði: www.hoydalar.fo

**Mentamálaráðið**

## LÆRARI TIL KOLLAFJARÐAR SKÚLA

Søkt verður eftir einum lærara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi í tíðarskeiðnum 8. januar – 27. juni.

**Lærugreinir:**
føroyskt í 2. flokki
kristni í 1., 2. og 3. flokki
teld í 4. – 6. flokki
serundirvísing

**Aðrar uppgávur:**
telduvørður

Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Um eingin við útbúgving søkir, verður annað fólk sett ístaðin.

Starvið er fulltíðarstarv og er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Eru spurningar, eru tit vælkomin at venda tykkum til skúlaleiðaran, Karin Hammer, á tlf. 30 25 53 ella 22 14 07 ella á teldupostbústaði karin.hammer@skulin.fo

Umsókn saman við CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 4. januar 2006 kl. 12.00.**

**Kollafjarðar skúli**
**Botnavegur 2**
**FO-410 Kollafjørður**

*Í Kollafjarðar skúla ganga í løtuni 144 næmingar í 1. til 9. flokki. 14 lærarar starvast í skúlanum. Kollafjarðar skúli er ein eitt-sporaður skúli við 9 árgangum. Vit arbeiða í 3 deildum við einum læraratoymi í hvørjari deild.*
*Býtt er soleiðis: 1.-3. flokkur, 4.-6. flokkur og 7.-9. flokkur.*

## Læknaskrivari/Skrivstovufólk til Heilsumiðstøðina í Vági

Søkt verður eftir Læknaskrivara/Skrivstovufólki at arbeiða á Heilsumiðstøðini í Vági, at byrja skjótast tilber.

Á heilsumiðstøðini starvast tveir læknar, sum tæna Sunnaru helvt av Suðuroynni.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving innan skrivstovuyrkið.
- Royndir innan skrivstovuyrkið.
- Aðrar viðkomandi royndir.
- Teldukønur.
- Fyrikomandi/Jaligur.

**Annað:**
- Tygum skulu hjálpa læknum og sjúkarøktarfrøðingi við skrivstovuarbeiði.
- Tygum skulu taka ímóti sjúklingum og avvarðandi.
- Tygum skulu svara telefon.
- Tað er sera umráðandi at tygum, sum starvsfólk á heilsumiðstøðini, er vinarligur og fyrikomandi, og ikki minst áhugaður í at eftirútbúgva tygum.
- Tað er umráðandi at tygum eru við til at hækka tænastustøði á heilsumiðstøðini.

**Setanartreytir:**
Møguleiki er bæði fyri fulltíðar- og hálvtíðarstarvi.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry Joensen tlf. 373024 ella Heilsumiðstøðina tlf. 373844

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða Vágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 22. desember 2006 kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til :

**VÁGS KOMMUNU**
Vágsvegur 22
FO-900 Vágur
Viðm. Læknaskrivari/Skrivstovufólk

# Fyritøka til sølu

Ein av kundum okkara ynskir at selja virkið heilt ella partvíst.

Tað snýr seg um eina spennandi handilsfyritøku í meginøkinum.

Fyrst og fremst verður hugsað um ein íleggjara, sum bæði hevur áhugað í at gerast partaeigari, og sum kanska hevur áhuga í at innganga í arbeiðið í fyritøkuni. Men talan kann eisini verða um yvirtøku av øllum virkinum beinanveg ella so við og við.

Meira fæst at vita við at venda sær til Grannskoðarastovuna á Skála, og tosa við Páll Højgaard.

**Sp/f. Grannskoðarastovan á Skála**
Tlf. 441 666 • Fax. 448 871
Teldupostur: pall@grannskodarastovan.fo

Lesið Sosialin -so eru tit við!

Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. +298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIROMENTAL AGENCY

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann **8. desember 2006,** við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Toskaalistøðina hja P/F Faroe Salmon á Árnafirði**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo.

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo